## DAGSINS MEINING

# Fólkaheilsan í fokus

Landsstýrismaðurin í heilsumálum, Hans Pauli Strøm, hevur boðað frá, at hann í komandi ólavsøkutingsetu fer at seta út í kortið ein fólkaheilsupolitikk, sum av álvara skal seta fólkaheilsuna hjá øllum føroyingum í fokus.

Hesum stigi kunnu allir føroyingar, uttan undantak, tora vit at siga, taka fult og heilt undir við. Fólkaheilsan er nakað, sum viðvíkur okkum øllum, og hana verður tað ongantíð tosað ella skrivað nóg nógv um.

Sjálvandi verður tað gjørt eitt stórt arbeiði frá ymsum síðum at fyribyrgja sjúkum og at grøða sjúkur. Men tað er líkasum, at alt ov mong av okkum geva sær ov lítið fær um týdningin av hesum. Tá tað verður endurtikið aftur og aftur, hvussu vandamikil royking er, uppliva vit kortini eina líkasælu og apati. Tað er sum um at tosað verður fyri deyvum oyrum. Tá tosað verður um, hvussu stóran týdning motión og rørsla hevur fyri hvønn einstakan av okkum, møta vit aftur somu líkasælu.

Ein hevur eftirhondini eina kenslu av, at líka mikið, hvussu nógv verður tosað, ráðgivið og ávarað um heilsuvandarnar í okkara gerandisdegi, so fer hetta bara framvið uttan at flestu okkara geva tí veruliga gætur. Hatta rakar ikki meg, hatta viðkemur ikki mær. Soleiðís er hugsanarhátturin í mongum førum. Hóast hagtølini vísa, at vit øll kunnu gerast offur fyri ymsum sjúkum, um vit ikki ansa okkum og lurta.

Nú verður oftani sagt, at øll hesi ráðini og ávaringarnar og eisini forboðini bara eru av tí ringa. Hvat skulu tey til. Er hetta ikki eitt frítt samfelag, har hvør eigur og kann gera sum hann ella hon vil! Tað er kanska nettupp henda múrin, henda barrieran, sum fólk í vælferðarsamfeløgunum í Vesturheiminum, eiga at royna at koma upp um. Tvs. eina sjálvrannsakan, har man gevur eins egna lívi og lívinum hjá sínum næstu størri ans.

At framstandandi politikarar vilja gera eina betri fólkaheilsu til sítt hjartamál er alla æru vert. Og hesum eiga vit øll at taka undir við og stuðla.  Og tí skal landsstýrismaðurin, sum nú av álvara og á ein menniskjansligan hátt vil seta ljóskastaran á fólkaheilsuna hjá øllum føroyingum, fáa okkara fulla stuðul.

Her hava vit sum miðil eisini ein týðandi leiklut. Hitt stóra blaðið tók herfyri upp táttin um fólkaheilsu, sum varð viðgjørd í fleiri sera áhugaverdum greinum. Vit vilja fegnir fylgja tropp og geva okkara íkast eisini til slíka greinarøð og harvið vera við til at gera arbeiðið hjá myndugleikunum lættari og betri.

So vónandi fara okkara lesarar í framtíðini at síggja meira til júst spurningin um fólkaheilsu føroyinga.

**Sosialurin**

## VIÐMERKINGAR

# Børn og starvsfólk á dagstovnum fyri vanbýti

**Vegna Føroya Pedagogfelag**
*Jarvin Feilberg Hansen, formaður*



Tað verður javnan framført, bæði í løgtinginum og í fjølmiðlunum, hvussu serliga væl tað hevur eydnast at leggja barnaansingina út til kommunurnar at umsita. Barnaansingin er tað fyrsta økið, sum er lagt út til kommunurnar at umsita.

Landspolitikkarar ásettu karmarnar við nýggju dagstovnalógini, áðrenn økið var lagt út, men ikki kann sigast at teir hava sæð til, at karmarnir eru samsvarandi lógini - heldur tvørturímóti.

Dagstovnalógin ásetur, at tað skulu vera í minsta lagi 2/3 námsfrøðingatímar og í mesta lagi 1/3 hjálparfólkatímar á hvørjum stovni. Støðan ídag er júst tann øvugta, og tað gongur við rúkandi ferð tann skeiva vegin. Tørvur er á umleið 160 pedagogum úti á dagstovnunum. Hóast hetta, so verður bert tikin ein flokkur inn á pedagogútbúgvingina. Tvs.,at skúlin tekur færri pedagognæmingar inn enn hvat nýggju stovnarnir hava tørv á. Serstakliga sæst, at tey smærru plássini hava sera torført at fáa útbúnar námsfrøðingar í starv.

Føroya Pedagogfelag hevur gjørt Mentamálaráðnum varugan við hetta í fleiri ár, men tað tykist ikki sum um politiski viljin er til staðar at loysa henda trupulleika.

Ein annar álvarsligur trupulleiki eru teir góðkennandi myndugleikarnir. Fleiri dagstovnar eru ikki góðkendir av heilsumyndugleikum, brunaumsjón og arbeiðseftirlitinum.

Vit spyrja mangan okkum sjálvi, hvar teir góðkennandi myndugleikarnir eru, tá tað snýr seg um viðurskifti hjá børnunum og starvsfólkunum á dagstovnunum. - Er tað veruliga so, at vit í Føroyum ikki raðfesta børn okkara hægri !

Hvat viðvíkur umsiting av dagstovnunum, hava tær stóru kommunurnar egnu sosialu deild - og hava tí sjálvsagt nógv størri møguleikar at seta seg inn í barnansingarviðurskiftini - og hava eisini størri fíggjarliga orku enn tær smærri kommunurnar.

Tórshavnar Kommuna hevur í fjølmiðlunum lovað, at tað verður veitt ansingartrygd til øll børn í Tórshavnar Kommunu aftaná 1. august 2004 - tað er jú val í ár. Fleiri nýggir stovnar eru bygdir, sum eru klárir at taka í nýtslu 1. august - men tað verður lítið og einki hugsað um hvørji fólk skulu starvast á hesum nýggju dagstovnunum. Harafturat roynir Tórshavnar Kommuna nú av øllum alvi at trýsta fleiri og fleiri børn inn á stovnarnar við tí úrslitið, at børnini og tey, ið starvast á stovnunum, hava sera vánalig kor at búleikast undir.

Harafturat eru tað hølisviðurskiftini á dagstovnunum. Føroya Pedagogfelag kann eisini her staðfesta, at krøvini als ikki verða hildin. Vit undrast eisini á, hví raðfestingin/viljin at fáa nøktandi karmar til børn og starvsfólkini, sum hava ábyrgdina av okkara dýrabara tilfeingið - børnini - ikki verður sett hægri.

Endamálsorðingin í Dagstovnalógini er væl orðað. - men hvat so !

Rætt er, at nógvir góðir nýggir stovnar eru bygdir, men tíðin er komin, har vit mugu seta dygdina/ kvalitetin á dagsskránna.

Vit liva eisini í einari tíð, har fleiri og fleiri foreldur og avvarandi seta krøv til dagliga innihaldið á stovnunum. Um ikki teir politisku myndugleikarnar gera nakað, verða tað tey, sum framyvir koma at seta krøvini.

Børnini hava krav uppá at fáa eina so góða byrjan uppá lívið sum til ber - og við tað, at tey eru í »varðveitslu« á dagstovnum meginpartin av degnum - mugu karmarnir vera so góðir, mennandi og tryggir, sum til ber.

Okkara vón er, at bæði landspolitikkarar og kommunalpolitikkarar veruliga fara at seta luppin á umstøðurnar og viðurskiftini úti á dagstovnunum.

# Einskiljingar hægstu prioritering

**Kaj Leo Johannesen**
*Sambandsflokkurin*



Tað eru fá lond í heiminum, hvar ið tað almenna er við í so stórum parti av vinnufyritøkunum sum í Føroyum. Hetta er ein støða, sum vit eiga at sleppa okkum burturúr sum skjótast, tí við hesum bygnaðinum verður ábyrgdin og hugurin at ganga nýggjar leiðir tikin frá einstaklingunum.

Tað er Sambandsfloksins áskoðan, at allar vinnufyritøkur, sum virka undir vanligum marknaðartreytum eiga at verða einskildar. Almenni leikluturin í vinnupolitikkinum eigur at vera avmarkaður til at skapa vinnuni góðar karmar og at verja onnur samfelagsatlit.

Seinastu árini hevur nógv verið tosað um einskiljingar, men lítið er komið burturúr, tí semja var ikki millum undanfarnu samgonguflokkar, um hvussu hetta skuldi gerast. Verandi samgonga hevur felt niður í samgonguskjalið, at partabrøv í almennum fyritøkum, sum til dømis Føroya Tele, Atlantsflog, Føroya Banka og LÍV kunnu verða boðin út til almenningin og strategiskar íleggjarar, har tað kann gerast við fyrimuni. Nú er tað upp til okkum politikarar at fremja hesi orð í verki.

Caragata álitið vísti á nógvar møguleikar at einskilja almennar føroyskar fyritøkur, men sjálvt endamálið við teimum einskiljingunum var at vinna landskassanum pening at fíggja fullveldið við. Hetta gevur onga meining, tí endamálið við einskiljingum eigur at vera eitt ynski um at skapa framdrift í feløgunum.

Tað skapar sunna og virðismikla ábyrgdarkenslu, at einstaklingurin fær loyvi at vísa, hvat hann dugir til, og tað góða úrslitið hjá einstaklinginum fer sjálvandi at koma samfelagnum til góðar.

Vit eiga tí at skunda undir einskiljingar av almennum fyritøkum, tí tað kann ikki vera rætt, at tað almenna skal liggja í vinnuligari kapping við privatar.


**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller
jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov
eirikur@sosialurin.fo
**Fíggjarleiðari:** Jákup Mørk
jakup@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
Jonhard Hammer jonhard@sosialurin.fo
Durita Simonsen durita@sosialurin.fo
Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Finnbjørg Nattestad
finnbjorg@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Edvard Joensen edvard@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Solby Eliasen solby@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Páll Holm Johannesen pall@sosialurin.fo
Heini í Skorini heini@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo
Eydna Skaale eydna@sosialurin.fo
Hans Kárason Mikkelsen
hans@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo
Terji Nielsen terji@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Postsmoga 231
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 220727
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**Sosialurin í Eysturoy:**
Postsmoga 143, Saltangará
tel. 447820 fax 449520
tel. 228909
e-post: vilmund@sosialurin.fo

**Sosialurin í Vágum:**
360 Sandavágur
tel. 333820, 220507 fax 333720
e-post: edvard@sosialurin.fo
e-post: vagar@sosialurin.fo

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Hestprent
Prent: Prentmiðstøðin

**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin

**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Argjavegur 26,
Tel. 341800, Fax 341801

**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn

**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 14[00]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Týsdagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Leygardagsblaðið | Frí. kl. 10 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støddir:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39mm og rúmið millum teigarnar er 4mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.




# Trojanski hesturin hjá Høgna Hoydal nú náddur Christinsborg!

**Regin Eikhólm**



Í trojanska krígnum (1200 f. kr.), tá býarmúrurin var grisku hermonnunum ov høgur, funnu grikkar upp á snildir, ið vit kenna sum »Trojanski hesturin«. Hesturin sá meinaleysur út og skuldi eitast at vera ein offurgáva til Athenu, krígs- og vísdóms gudinna grikka. Góðvarnir trojanar lótu henda sakleyst útsíggjandi træhestin  sleppa inn um Trojanska verjumúrin, men hetta gjørdist teirra endaliga, tí hesturin vísti seg at vera fullur av valdsjúkum griskum hermonnum, sum við hesi snildu ráðagerð kundu taka valdið í Troja.

Ráðstevnan, »Hovedet på blokken«, á Christiansborg herfyri, sum danskt fíggjaði norðuratlansbólkurin skipaði fyri, er hugfrøðisliga ikki ólík omanfyristandandi. Síðani sitandi samgonga - við kvalifiseraðum meirluta av Føroya fólki aftan fyri seg - fór út í Tinganes, er demokratiski múrurin heima í Føroyum vorðin Høgna Hoydal (HH) ov høgur. Við bert 25% aftan fyri seg og í andstøðu er HH í dag reelt uttan ávirkan í føroyskum politikki. Tann tíðin er farin, tá møguligt var at útnevna seg sjálvan til hentleika ministara í loysing ella hissini føroyskum lógarsmíði og at brúka tíggjutals mill. krónur upp á eina »Hvítubók«, sum helst er mest »farvaða« ministarahondbók í friðartíð.

### Trojanski ráðstevnu hesturin

Fyri at skapa mest møguligt rumbul í tí annars demokratiskt vælvirkandi ríkisfelagsskapinum vóru sjálvssøknu snildarráðini hjá HH - uttan um Landsstýrið - at taka mest viðkvæma mál millum Føroyar og Danmark upp til viðgerðar innan fyri múrarnar á sjálvari Christiansborg, og »legalt« fáa kompetent fólk at røða um og/ ella uttan um eitt viðkvæmt evni, nevniliga blokkin. Formaðurin í búskaparráðum og onnur við honum hoppaðu galant inn í »Trojanska ráðstevnu hestin« hjá HH og komu soleiðis uttan nakað hóvasták inn um múrarnar. Trupulleikin hjá hesum fólkum og ikki minst hjá formanninum í búskaparráðum er ikki, hvat tey søgdu ella ikki søgdu, men at tey lótu seg tøla til at fara inn í »Trojanska ráðstevnu hestin« og vera við til at bróta niður álitið millum sitandi landsstýrið og ríkisstjórnina. Eftir »ráðstevnuna« noyðist Landsstýrið at brúka nógva óneyðuga tíð og orku fyri at kyrra og fáa arbeiðsfrið í ríkisfelagsskapinum, umframt at skula liva við tí negativu umtalu og illgitingum sum fylgja í kjalarvørrinum.

### At dríta í egið reiður

Fyri HH er hetta ein tilvitað process og tænir einans til at seta lús í pelsin hjá ríkisfelagsskapinum. Sjálvur gjørdi HH sær dælt av tí eftirfylgjandi negativu skriving í donsku bløðunum og vísti á, at nú vilja danir hava loysing. Tað er ringur fuglur, ið drítur í egið reiður, og tað kennist sárt at annað av okkara fólkatingsumboðum nærmast hevur atferð sum ein antiføroyingur.

HH gekk á odda fyri at minka blokkin við 366 mill. kr. og lovaði, at alternativar inntøkur skuldu koma ístaðin, men tað vóru bert orð. Og orð eru heldur ikki tað sum spindoktarin hjá HH manglar nú um dagarnar. Øll sum ditta sær at hava eina fatan um »Hovedet på blokken« ráðstevnuna, og ikki eru samd við HH, fáa gall og gor oyst yvir seg frá spindoktarinum, og tað uttan mun til, um tú ert ein vitandi og vælargumenterandi útiseti ella ein seriøsur blaðstjóri her heima.

### Demokratiskt frælsi og lívsfrælsi

Demokratiskt frælsi er at kunna fara frá møguleika til veruleika, og tað frælsið hevur Føroya fólk longu í dag. Lívsfrælsi harafturímóti krevur, at bæði fysiskar-, sosialar- og fíggjarligar umstøður eru til staðar. Okkara lítilleiki og einstreingjaða vinnulív ger okkum viðkvom fyri ávirkan uttanífrá, og tí vil ein størri felagsskapur eitt nú ríkisfelagsskapurin hava eina stabiliserandi ávirkan á okkara lívsfrælsi, ikki bara takka verið blokkinum men eisini. At føroyingar sum heild eru glaðir fyri tey rættindi, ið felagskapurin gevur, sæst millum annað av, at í 2003 útskrivaði Fútaskrivstovan 6344 pass harav 2/3 vóru EU pass.

At nútíðarmenniskja velur felagsskap við lívsfrælsi fram um ideologiskt einmansveldi er EU eitt talandi dømi um, eins og fólkið í Hesti einmælt valdi felagskap við Havnina og harvið størri lívsfrælsi. Eisini í Serbia hevur mann nú slept stagneraðu nationalistisku kósini og vendir sær móti felagskapinum í EU.

### Nationalistisk frælsistáta

Tað eru mong tekin í sól og mána, at HH hevur somu uppskrift til sítt ágangandi nationalistiska loysingar frælsi (frelsu), sum chefideologurin í London hevði til sítt tilætlaða kommunista frælsi (frelsu) fyri Føroya fólk. Teirra frælsistáta er eitt ideologiskt einmansveldi (kommunisma/nationalisma) uttan um ta demokratisku processina og uttan atlit til føroyskt lívsfrælsi yvirhøvir. Vit vita, at kommunisman hevði verið fatal fyri Føroyar, og tað er onki sum talar fyri, at nationalisman hjá HH hevði verið betri. Nýggjari europeisk søga lærir okkum, at ágangandi nationalisman er kamufleráð maktgirnd og hevur lítið til felags við okkara demokratisku siðvenju. Hetta veit altjóða dómstólurin í Haag alt um.

### Ódemokratiskur tjóðskaparligur dominansur

Tað er ein útbreidd fatan, at okkara almennu loftmiðlar hava stuðlað meiri undir loysingarhallan tíðindaflutning enn undir felagsskapssinnaðan tíðindaflutning. Hanus Kamban, rithøvundur, sum fekk mentanarvirðisløn landsins í ár, sigur í blaðsamrøðu í Sosialinnum 2/6-04, »at tjóðskaparliga umboðanin í føroyska mentanarlívinum er ov sjónlig og ávirkandi«. Møguliga er grund til at halda, at tað finnast fleiri smáir »Trojanskir hestar« runt um, og tí eigur Føroya fólk ikki bara at lata standa til, men vísa ábyrgd fyri tí demokratiska samfelag og tess lívsfrælsi, sum vit í felagsskapi hava uppbygt og eru góð við.

# Stovnsmetingarnar hjá Jón Kristjánsson byggja á skeivt grundarlag

**Jón Kristjánsson kann ikki uttan víðari kopiera stovnsmetingar av sílum á Leitisvatni og Fjallavatni til at umfata toskin á føroyska Landgrunninum**

**Eyðfinn Magnussen**
*Biologur, Fróðskaparsetur Føroya*
*E-mial eydfinnM@Setur.fo*



Tað eru helst eingin persónur í nýggjari tíð, sum hevur havt so stóra ávirkan á føroyska samfelagið, sum íslendski fiskifrøðingurin Jón Kristjánsson. Tey seinru árini hava hansara tilmæli um føroysku fiskastovnarnar vigað rættuliga tungt, tá avgerðir eru tiknar um, hvussu nógv kann fiskast á føroyska landgrunninum. Útgangsstøðið hjá Jón Kristjansson er, at ov lítið er til av føði er til fiskin. Við at tynna út í stovninum verður meira føði til fiskin, ið eftir er. Fiskurin veksur skjótari, og tilgongdin verður betur. Hetta er eisini vanligt fyri fisk í feskvatni, so sum síl og laks, menn eru ikki so avgerandi fyri fisk, sum livir í havinum.

### Føðitrot á feskvatni

Í feskvatni er vanliga ikki nóg mikið av føði, at fiskurin kann vaksa seg heilt stóran. Tí er neyðugt, at bæði laksur og síl mugu út á sjógv, skulu tey gerast stór. Seinri venda tey so aftur til áirnar at gýta. Laksur, sum verður gýttur í føroysku áunum, livir har tey fyrstu umleið 3 árini. Hesi 3 árini vaksa laksamaðkapirrurnar einans einar 15 cm. Eftir hetta fara tær á sjógv. Har er nóg mikið av føði, og eftir bert einum ári, veksur laksurin frá 15 cm til einar 60 cm. Hjá sílum er fyribrigdið hitt sama.

### Ikki øll síl hava møguleika at koma á sjógv

Síl sum hava møguleika at koma út á sjógv, kunna gerast stór. Tað eru tó ikki øll síl, sum hava hendan møguleika. Í summum vøtnum er sambandið við sjógvin so vánaligt, at sílini antin ikki kunna svimja út á sjógv, ella, um tey gera tað, ikki kunnu koma aftur í vatnið. Eitt eyðkenni fyri hesi síl er, at tey ikki gerast serliga stór. Dømið um tílík vøtn í Føroyum eru Leitisvatn á Vágoynni, Stóravatn á Sandoynni og Toftavatn í Eysturoynni. Í Leitisvatni eru sílini 15-30 cm long, á Toftavatni 25-35 cm meðan tey á Stóravatni eru 20-40 cm long. Sílini á Stóravatni eru ikki bara tey størstu. Har er eisini nógv mest til, og tey eru eisini tey feitast sílini í hesum 3 vøtnunum.

### Vøksturin hjá sílum

Hvussu stór sílini gerast í teimum ymisku vøtnunum, er í høvuðsheitum treytað at 2 faktorum. Gróðurin av plantuplanktonni í vatninum, og hvussu nóg síl eru at eta føðina. Gróðurin er stýrdur av føðslusøltunu (gjødningi). Eru nógv føðslusøltir í vatninum, er eisini nógv føði. Serliga er tað fosfor, ið tarnar gróðrinum í vøtnum. Grundin til, at sílini á Stóravatni bæði eru stór og eisini nógv í tali, er helst tað ríka fuglalívið, ið finst á vatninum. Fuglurin skítur í vatni. Skarnið inniheldur nógv fosfor, sum skapar góð gróðrarlíkindi hjá planktu plantonninum. Dømi við sílunum í Stóravatni vísir, at tað saktans ber til, bæði at hava nógv og stór síl í einum vatni. Bara nokk er at eta.

### »Tusindbrødre«

At ov nógv er til av fiski í mun til føðina er eitt vanligt fyribrigdi í vøtnum. Í Danmark verður hetta fyribrigdið nevnt »tusindbrødre«. Felags eyðkenni fyri »tusindbrødre«-fiskastovnar er, at tað bert eru smáir og klænir fiskar. Hesin fiskur hevur lítlan áhuga hjá frítíðarfisskarum. Bøtast kann um støddina við at sleppa rovfiskum (t. d. geddum) í tílík vøtn. Rovfiskarnir eta burtur av teimum smáu fiskunum. Stovnurin verður minni, so vøksturin hjá teimum, ið eftir eru, verður betur. At fiskað verður í ríkiligt mát í tílíkum vøtnum hevur somu ávirkan.

### Jón Kristjánsson ikki fremmandur í Føroyum

Jón Kristjánsson hevur fyrr arbeitt í Føroyum. Hetta var í 1978. Tá gjørdi hann kanningar av sílunum á Leitisvatni og á Fjallavatni. Kanningin hevði sum endamál at lýsa vøksturin og livilíkindini hjá sílunum í hesum báðum vøtnunum. Ein frágreiðing er skrivað um kanningarnar. Hon finst eisini í einari føroyskari týðing hjá Ólavi Poulsen av Vatnsoyrum. Niðurstøðan hjá Jón Kristjánsson er, at alt og nógv síl eru í vøtnunum. Ov lítil føði er í part, og tí vaksa sílini so seint. Fyri at betra um stovnin, sigur Jón Kristjánsson:

*»... er neyðugt at byrja mikla veiði í báðum vøtnunum, og tá serliga í Leitisvatni. Vanligt er at fiska við tráðu, men tað er ikki nóg mikið. Tað má eisini fiskast við gørnum«*

Hesin ráðini kenna vit aftur. Hetta er júst tað sama, sum hann sigur um toskastovnin á føroyska landgrunninum.

### Grundarlagið undir tilmælinum er skeivt

Ráðini hjá Jón Kristjánsson um stovnsrøktina av sílunum á Leitisvatni og Fjallavatni eru ivaleyst skilagóð, menn kunnu ikki uttan víðari brúkast fyri føroyska toskin. Grundin er, at her er talan um heilt ymiskar vistskipanir. Vøtn eru nógv meira einsháttað enn havið. Fiskur í vøtnum hevur ikki somu ferðingarmøguleikar sum í havinum. Hann kann ikki fara til onnur økir ella út á djúpt vatn. Í havinum er sjáldan føðimangul. Gamaní kann tað til tíðir vera minni at eta, so at fiskurin gerst rak og veksur seinri, men tað er ikki so, at toskurin kann fleirfalda sína longd eftir stuttari tíð, við at svimja til onnur økir.

Tá útgangsstøðið í stovnsmetingunum hjá Jón Kristjánsson er skeivt, verður úrslitið hareftir. Tí er tað spell, at føroysku fiskiveiðumyndugleikarnir taka ráðini hjá honum í so stórum álvara. Fastheldur Jón Kristjánsson um, at lívshátturin hjá feskvatnfiski kann førast yvir á føroyska toskin, hýsuna og upsan, eigur hann at koma við upplýsingum, sum kunna staðfesta, at hetta er so.

Jón Kristjánsson endar frágreiðing sína um sílini á Leitisvatni og Fjallavatni við at koma við ráðum um, hvussu veiðitrýstið á vøtnunum kann økjast, so meira fæst burtur úr. Hann endar frágreiðingina sína við at siga:

*»Tá til tað kemur, eri eg til reiðar, um neyðugt, at veita leiðbeining fyri at nýta vøtnini betur«*

Kanska átti Jón Kristjánsson at hildið seg til Leitisvatn og Fjallavatn.

# Ólavsøkugudstænastan

**Christian M. Poulsen**

Fall mær fyri bróstið at ólavsøkugudstænastan skal haldast á útlendskum máli. Vælvitandi, at Gud skilir øll mál, so má eitt mark verða fyri »koloniini«.